# Neistin vil hava nýggjan dyst

**Eitt dómaramistak gav Boga Simonsen reytt kort, tá Neistin dystaðist móti KÍF. Í Neistanum halda tey, at hetta fekk avgerandi ávirkan á dystin, sum tey tí vilja hava spældan umaftur**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Skal felag hava rætt til nýggjan dyst, tá eitt klokkuklárt dómaramistak hevur avgerandi ávirkan á úrsliti av dystin.

Tað er høvuðsspurningurin, sum Neistin hevur sett bæði kappingar- og dómsnevndini hjá HSF.

### Fekk reytt aðru ferð

Upprunin til hendingina skal finnast í næsta dystinum hjá mansliðnum hjá Neistanum hetta kappingarárið. Hesin var í Hoyvíkarhøllini móti KÍF, og sum so var talan ikki nakað merkisvert fyrstu trý korterini av dystinum.

Eitt korter fyri leiklok kom tó hendingin, sum fekk Neista-sinnini í kók. Bogi Simonsen fekk tá sína aðru útvísing, og sum so var eingin, sum mótmælti hesum. Dómaraborðið gjørdi tó dómararnar varugar við, at talan var um triðju útvísingina, og at spælarin tí skuldi rekast av vøllinum.

Neista-spælarar og -venjari vóru í øðini. Teir hildu fast um, at talan bara var um aðru útvísingina. Dómaraparið sjálvt hevði ikki ført yvirlit yvir útvísingar v.m., soleiðis sum eitt par annars eigur at gera, og tí kundu teir ikki gera stórt annað, enn at fylgja boðunum frá dómaraborðinum.



*Á pappírinum hevur úrslitið av dystinum ikki tað stóra at siga. Men í Neistanum vilja tey hava staðfest, hvat virði er í at føra dómaraseðlar*

### Eingi prógv

Eftirfylgjandi hevur Neistin so kært málið til kappingarnevndina, men her fekk kæran ikki viðhald.

- Við støði í, at dómaraseðilin er undirskrivaður av bæði dómaraborði og dómarunum, hevur kappingarnevndin valt, at tey ikki gera meira við málið, er staðfestingin frá hesi.

Seinni hevur Neistin so eisini kært málið til Dómsnevndina. Svarið frá hesari kom 13. desember, men heldur ikki her var nøkur hjálp at heinta.

Fyrst og fremst, so grundar Dómsnevndin sítt svar á, at tað ikki ber til at prógva, hvørt eitt mistak er farið fram ella ikki. Teir hava millum annað hoyrt bæði dómarar og dómaraborð í málinum, men hvørgin parturin hevur her staðfest, at talan var um mistak.

»Dómsnevndin metir, at tá dómararnir í einum dysti hava tikið avgerð um, at ein leikari skal reyða kortið, skal Dómsnevndin hava tilfar, sum heilt greitt prógvar, at talan var um eitt mistak, áðrenn tað kann koma upp á tal fyri Dómsnevndina at áseta, at nýggjur dystur skal leikast. Dómsnevndin hevur ikki fingið tílíkt tilfar í hesum málinum«, er greiða staðfestingin í skrivinum, sum Dómsnevndin hevur latið Neistanum.

### Gera neyvan meira

Í Neistanum hava tey enn ikki tikið støðu til, hvørt tey fara at kæra málið víðari til Ítróttardómstólin.

-Vanliga verður jú góðtikið, at Dómsnevndin hevur avgerðarmyndugleikan, og spurningurin er helst, hvørt vit vilja nýta meira orku upp á hetta málið, sigur formaðurin í Neistanum, Jón Kragesteen.

- Fyri okkum er talan tó um rættiliga prinsipiellan spurning. Umboð fyri dómaraborðið hava fyri okkum viðgingið, at talan var um mistak, men hetta er ikki tað, sum er sagt í frágreiðingini til Dómsnevndina. Samstundis er hetta eisini ein spurningur um, hvørt ein dómaraseðil er nakað sum helst verður. Sambært dómaraseðlinum framgongur jú púra greitt, at talan var um mistak, men hetta hevur ikki nakað virði í próvførsluni. Og tað er ein rættiliga prinsipiellur spurningur fyri okkara viðkomandi.

Jón Kragesteen sigur annars, at tey enn einaferð hava sett seg í samband við umboð fyri dómaraborðið.

- Vit vilja hava at vita, hvør frágreiðing er galdandi. Men sum sagt, so veit eg ikki, hvørt vit annars fara at gera meira við málið.

## Dómararnir verða bakkaðir upp

Upprunin til málið um kæruna frá Neistanum, er kanska fyrst og fremst, at dómaraparið í dystinum - Rúni Mohr og Ragnar Rasmussen - ikki førdi nakað yvirlit yvir útvísingar og annað, soleiðis sum eitt dómarapar eigur at gera.

Formaðurin í Dómarafelagnum, Eyðun Samuelsen, ásannar, at talan var um eitt mistak hesum viðvíkjandi, men hann vil á ongan hátt harta dómararnar fyri hetta.

- Fyrst og fremst, so skal viðmerkjast, at dysturin varð framskundaður. Tí verða dómararnir ringdir upp við boðum um at møta alt fyri eitt. At teir so í hesum gloymdu kortini at skriva á eftir, er sjálvandi harmiligt, og teir áttu helst at funnið upp á onkra neyðloysn hesum viðvíkjandi.

- At talan so samstundis verður um ein dyst, har slíkt ivamál skal stinga seg upp, ger sjálvandi støðuna enn meira keðiliga. Og hetta ásanna dómararnir eisini sjálvir.

- Talan er um eina øgiliga keðiliga hending. Og eingin man harmast hetta meira enn dómararnir sjálvir. Men tíbetur kunnu vit staðfesta, at teir báðir hava reagerað positivt upp á hetta. Teir hava dømt nógvar dystir síðani, og teir hava eisini dømt væl, og tað haldi eg vísir, at teir hava rætta hugburðin til dømingina, staðfestir Eyðun Samuelsen at enda.

**-mørk**

## Alonso og Vodafone skifta til McLaren Mercedes



McLaren liðið hevur boðað frá at høvuðsstuðulin hjá Ferrari og fyrsti koyrarin hjá Renault skifta til McLaren Mercedes frá kappingarárinum 2007

Fernando Alonso er heimsmeistari í formel 1 og hevur, í øllum førum so vítt, sum okkum er kunnugt, liðstjóran í Renault liðnum Flavio Briatore sum umboðsmann, hetta kann tó vera broytt, uttan, at vit hava fingið frænir av tí. Men kappingarárið 2006 verður seinasta kappingarár, sum Alonso koyrir fyri franska liðið í hesum umfarinum í øllum førum. Hetta eru rættiliga løgin tíðindi, tí umframt tætta sambandið ímillum Briatore og Alonso, so hevur McLaren tveir av sterkastu koyrarunum í formel 1 í Montoya og Räikkönen, hvør av hesum fær sekkin aftan á 2006 er ikki gott at vita.

Vodafone hevur seinastu árini verið høvuðsstuðul hjá Ferrari, og reyðu farvurnar hjá Ferrari hava givið Vodafone óvanliga nógv lýsingarpláss. Men í framtíðini verður tað McLaren liðið, ið skal bera Vodafone rundingin við 300 kmt kring heimsins formel 1 breytir. Hetta er uttan iva orsakað av, at Vodafone eins og restin av heiminum, væntar at gullfuglurin hjá Ferrari Michael Schumacher leggur í eftirlønarreiðrið aftan á komandi kappingarár.

**-nud**

# 30 hava fingið landsliðsboð

**Nýggi landsliðsvenjarin hevur við innkallingini til venjingarlegu givið til kennar, at hann í brutto hópinum hevur fleiri ungar spælarar, sum fáa møguleikan at vísa, um teir eru búnir at taka við altjóða avbjóðingum**

VENJINGARLEGA
*Jóannes Hansen*

Jógvan Martin Olsen hevur sent bestu føroysku fótbóltsspælarunum jólabræv. Innihaldið er innkalling til fyrstu venjingarleguna við nýggja oddamanninum fyri landsliðnum. Venjingarlegan verður í Havnini 7. og 8. januar. Umframt venjingarnar á vøllinum er ætlanin at spælararnir skulu fáa kostvegleiðing frá landsliðslæknanum Jens Paula Marstein, og so fara ætlanirnar fyri nýggja landsliðsárið at verða lagdar fyri spælararnar.

Teir, sum droyma um at gerast landsliðsspælarar, og sum ikki hava fingið boð til fyrstu venjingarleguna, mugu ivaleyst rokna við, at teir skulu stríða serliga nógv fyri at koma í altjóða hitan. Venjarin hevur givið 30 spælarum boð, og tískil eigur hesin hópurin at verða roknaður sum brutto landsliðið.

Tosað hevur verið um ættarliðsskifti, og millum teir, sum hava fingið boð, eru nógvir blaðungir spælarar. Her verður eitt nú hugsað um Christian R. Mouritsen í Manchester City, Jóhan T. Davidsen í Everton, Hans Paula Samuelsen og Bárð Olsen úr EB/Streymi, Jann Inga Petersen úr B68, Hanus Thorleifsson, sum nú umboðar B36, og Jónas Tór Næs úr Frem.

Jens Martin Knudsen telist ikki longur millum spælararnar. Hann er málmansvenjari. Saman við Jákupi Mikkelsen hava tveir aðrir málverjar fingið boð. Teir eru Bárður Johannesen úr HB og Gunnar Nielsen úr Frem. Tað tykjast altso at vera veteranurin í HB og ungi eykamálverjin í Frem, sum skulu stríðast um at verða annar av landsliðsmálverjunum.

Todi Jónsson hevur áður boðað frá, at hann ikki er tøkur til landsliðið, og Julian S. Johnsson tykist á B68 liðnum at skula prógva, at hann framvegis er upplagt landsliðsevni, áðrenn hann verður boðsendur.

Teir, sum hava fingið landsliðsboð eru Jákup Mikkelsen, Hanus Thorleifsson, Bergur Midjord og Fróði Benjaminsen úr B36, Bárður Johannesen, Janus Joensen, Jákup á Borg, Kári Nielsen og Rasmus Nolsøe úr HB, Atli Danielsen, Heðin á Lakjuni og Hjalgrím Elttør úr KÍ, Símun Samuelsen úr Keflavík, Mortan úr Hørg úr VB, Hanus Jacobsen úr GÍ, Hans Pauli Samuelsen og Bárður Olsen úr EB/Streymi, Pauli G. Hansen og Jónhard Fredriksberg úr Skála, Høgni Zachariassen úr ÍF, Jann Ingi Petersen úr B68, Christian H. Jacobsen úr NSÍ, Óli Johannesen úr TB, Rógvi Jaocbsen úr KR, Andrew av Fløtum úr Fremad Amager, Christian R. Mouritsen úr Manchester City, Jón Rói Jacobsen, Gunnar Nielsen og Jónas Tór Næs úr Frem og Jóhan T. Davidsen úr Everton.